# Gæðingakeppni FÍR

Í gæðingakeppni setur ryttarin sjálvur programmi saman í innleiðandi kapping. Man hevur loyv at skifta veg einaferð í programminum. Man nýtist bert at vísa eina langsíðu pr. gongulag og eina hálva langsíðu av fet. Man hevur eina langsíðu til yvirs at forbetra eitt gongulag, og tá er tann betra langsíðan ið telur. Tað er ikki loyv at nýta písk, tó undantiki í tannáringaflokki og barnaflokki.

## A-flokkur

Eitt ross, ið luttekur í A-flokki kann ikki luttaka í B-flokki til somu kapping.

Í A-flokki verður riðið 3 rundir har víst verður **tølt, fet, trav, lop/tvíspor og skeið**. Tað er loyv at vísa skeið á 175m beinum bana. Tá man er byrjaður at gera klárt til skeið, er tað ikki loyvt at ríða í runding ella venda.

Aldursmark **22+** ár

**A-Class Gæðinga (5 gaited horses)**

| | Element | Score | Value |
|---|---|---|---|
| 1. | *Walk* | *5-10* | *1* |
| 2. | *Trot* | *5-10* | *1* |
| 3. | *Tölt* | *5-10* | *2* |
| 4. | *Canter/Gallop* | *5-10* | *1* |
| 5. | *Pace* | *5-10* | *2* |
| 6. | *Spirit* | *5-10* | *2* |
| 7. | *General impression* | *5-10* | *2* |

**Finala**

Upp til 2 rundir pr. gongulag á báðum síðum. Víst verður tølt, trav og 2 sprettir skeið.

## B-flokkur

Eitt ross, ið luttekur í B-flokki kann ikki luttaka í A-flokki til somu kapping.

Í B-flokki verður riðið 3 rundir har víst verður **seint tølt, skjótt tølt, fet, trav og lop/tvíspor.**

Aldursmark **22+** ár

**B-Class Gæðingar (4 gaited horses)**

| | Element | Score | Value |
|---|---|---|---|
| 1. | *Walk* | *5-10* | *1* |
| 2. | *Trot* | *5-10* | *1* |
| 3. | *Slow tölt* | *5-10* | *1* |
| 4. | *Canter/Gallop* | *5-10* | *1* |
| 5. | *Fast tölt* | *5-10* | *1* |
| 6. | *Spirit* | *5-10* | *2* |
| 7. | *General impression* | *5-10* | *2* |

**Finala**

Upp til 2 rundir pr. gongulag á báðum síðum. Víst verður seint tølt, trav og skjótt tølt. 1 minutt pausa í tá tað verður skift veg í travinum, og 2 minutt pausa í tá tað verður skift veg í skjótum tølti.

## A-flokk ung

Eitt ross, ið luttekur í A-flokki kann ikki luttaka í B-flokki til somu kapping.

Í A-flokki ung verður riðið 3 rundir, har víst verður **fet, tølt, trav, lop og skeið**. Tað er loyv at vísa skeið á 175m beinum bana. Tá man er byrjaður at gera klárt til skeið, er tað ikki loyvt at ríða í runding ella venda. Her verður vilji og form undir rytta eisini dømt. Alt vektar 1.

Aldursmark **18-21** ár

**Finala**

Upp til 2 rundir pr. gongulag á báðum síðum. Víst verður tølt, trav og 2 sprettir skeið.

## B-flokkur ung

Eitt ross, ið luttekur í B-flokki kann ikki luttaka í A-flokki til somu kapping.

Í B-flokki ung verður riðið 3 rundir, har víst verður **fet, seint tølt, trav, lop/tvíspor og skjótt tølt**. Her verður vilji og form undir rytta eisini dømt. Alt vektar 1.

Aldursmark **18-21** ár

**Finala**

Upp til 2 rundir pr. gongulag á báðum síðum. Víst verður seint tølt, trav og skjótt tølt. 1 minutt pausa í tá tað verður skift veg í travinum, og 2 minutt pausa í tá tað verður skift veg í skjótum tølti.

## Tannáringaflokkur

Í tannáringaflokkinum verður riðið 3 rundir, har víst verður **fet, seint tølt, trav, lop/tvíspor og skjótt tølt ella skjótt trav.**

Aldursmark **14-17** ár

**Finala**

Upp til 2 rundir pr. gongulag á báðum síðum. Víst verður seint tølt, trav og skjótt tølt ella skjótt trav. 1 minutt pausa í tá tað verður skift veg í travinum, og 2 minutt pausa í tá tað verður skift veg í skjótum tølti/travi.

## Barnaflokkur

Í barnaflokkinum verður riðið 2 rundir har víst verður fet, **trav og/ella tølt og lop/tvíspor**. Um man velur at ríða tølt og trav, verður betra dómaratalið brúkt.

Aldursmark **10-13** ár

**Finala**

Upp til 2 rundir pr. gongulag á báðum síðum. Víst verður tølt og/ella trav (um man velur at ríða bæði gonguløgii, verður betra dómaratalið brúkt) og tveir sprettir av lop/tvíspor.